# Bartal var nakað heilt fyri seg

*GÍ framdi besta føroyska avrikið í Europa Cup higartil í ár hóskvøldið. Hóast tepra tapið, hevði GÍ eitt stórt orð at skula sagt í dystinum*



*GÍ stríddist manniliga allan dystin, og serliga positivt var at síggja, hvussu væl ungu leikararnir á liðinum royndust. Her er tað Hans Pauli Petersen, sum er í hornatøkum við svenskan leikara*

***Mynd:Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

GÍ-IFK Norrkøping 0-2

At tað ikki bert eru gøtufólk, sum hava stóra tiltrúgv til lið sítt, var sjónligt, tá dysturin millum GÍ og svenska IFK Norrkøping varð brívslaður í gongd hóskvøldið.

Knappliga 700 áskoðarar vóru á Tórsvølli, og hóast meginparturin av hesum mundu koma úr Gøtu, so vóru tó eisini fólk aðrastaðni frá.

**Ógvuslig byrjan**

Tey av hesum, sum høvdu roknað við einum góðum føroyskum úrsliti, mundu tó fáa ein rættuliga skelk fyrstu løtuna. Fyrstu løtuna tóktust gøtumenn hava ilt við at venja seg við undirlagið og leikferðina, og sviar nýttu høvið til eitt rættuligt skriðulop oman móti gøtumálinum.

Meira enn tí einu ferðina kom fyri, at svenskur leikari stóð púra leysur í brotsteiginum, men tíbetur tóktust kanónir teirra als ikki at vera rætt innstillaðar. Harðast leikaði á, tá Pauli ta einu ferðina mátti bjarga á strikuni, men hóast alt, so megnaðu gøtumenn hesa løtuna at halda málið reint.

So við og við byrjaðu gøtumenn tó at koma fyri seg, og tá komið var um miðjan hálvleikin, kom alsamt oftari fyri, at gøtumenn eisini vitjaðu á svensku hálvuni.

Fyrsta hvøkkin fingu sviar, tá Súni Olsen brádliga var um at gerast leysur, men í evstu løtu varð takklaður.

GÍ hevði ikki meira enn vunnið á ógvusligu byrjanini, so fingu teir næsta hvøkkin. Í eini roynd at steðga mótstøðumanni, var Rúni Justinussen dekan ov harðligur. Dómarin gav beinanvegin gula kortið, men verri var tað, at Rúni eftir brestin noyddist at gevast. Hetta viðførdi, at GÍ noyddist at gera nakrar flytingar, sum ein kundi vænta fóru at órógva rútmuna, sum teir júst høvdu funnið.

At tað ikki varð soleiðis, komst av fleiri orsøkum. Súni, sum varð fluttur á bakkin, fall beinan vegin inn í nýggja leiklutin, Hans Pauli Petersen, sum kom á vøllin fyri Rúna, fór fullkomuliga ósmæðin undir uppgávuna, og har til hevði miðvøllurnar hjá GÍ nú fingið eitt nógv betri tak um dystin.

**GÍ hótti eisini**

Í Føroyum verður ofta tikið til, at gøtumenn hava ein ótrúligan stríðsvilja og eru sera væl fyri kropsliga, og at hetta ikki bert er galdandi í Føroyum, sást á øllum brøgdum, tað sum eftir var av dystinum.

Tað hendir jú rættuliga ofta, tá føroysk lið royna seg, at konsentratiónin svíkur eitt bil, og áðrenn føroyingarnir aftur hava savnað tankarnar, so skora mótstøðumenninir.

Hetta hendi tó als ikki hósdagin. Heldur var tað øvugt, og við eitt sindur av hepni kundu gøtumenn eisini fingið mál, tá fyrri hálvleikur var farin at halla. Fyrst hevði liðskiparin. Magni Jarnskor, eitt drønandi skot úr 20 metrum, og løtu seinni skeyt sami Magni upp um ur góðari skotstøðu.

**Bartal var framúr**

Gøtumenn høvdu sostatt framvegis sama setning, tá teir fóru á vøllin til seinna hálvleikin, og nú smæddust teir als ikki burtur fyrstu løtuna.

Tað vóru to framhaldandi sviar, sum høvdu yvirvág í spæli, og hóast tað helst var uppiborið, so mundu gøtumenn iðra seg, tá gestirnir fingu lagt seg á odda.

Eitt hornaspark varð sent innfyri, og onkursvegna kavaði Jonas Wallerstedt niður í bóltin, so hann við høvdinum fekk stýrt bóltinum móti Gí meskunum.

Hetta tók tó á ongan hátt móti frá vertunum, og løtu seinni var eisini um reppið at teir javnaðu. Eftir hornaspark var Bartal Eliasen hægstur, men knallharði stútarin kom beint á málverjan, so hesin fekk sligið upp um.

Sami Bartal var annars klárt besti gøtumaður á vøllinum hóskvøldið. Ikki soleiðis, at aðrir av gøtumonnunum skulu forsmáast, men tað var eingin, sum kom nær námind Bartali. Í luftini vann hann so at siga alt, og heldur ikki í spælinum niðri á grasinum formáddu sviar sær nakað serligt. Harumframt slapp hann sær so at siga hvørja ferð skilagott av við bóltin.

Nú skla tað sjálvagt ikki vera so, at ein leikari kemur á landsliðið eftir bert ein góðan dyst, men tað má siggast at vera ógvuliga løgið, um Bartal ikki styrkti álvarsliga um støðu sína í so máta hóskvøldið.

**Satsaði**

Ein annar leikari, sum gjørdi nógv um seg ta løtuna, hann var á vøllinum, var Helgi L. Petersen.

Nakað inn í seinna hálvleik framdi GÍ venjarin eina rættuliga offensiva útskifting, tá hann tók Paula Jarnskor og Jóan Paula Olsen út til frama fyri Helga og Poul Henning Jacobsen.

GÍ miðvøllurin varð av hesum nógv meira framrættaður, og ein kundi kanska verið bangin fyri, at hetta fór at kosta. Teir báðir nýggju menninir, og serliga Helgi, settu tó veruliga ferð á framrættaða spælið, og og í roynd og veru áttu gøtumenn at fingið eitt útjavnandi mál.

Meira enn næstan gjørdist tað tó ongantíð, hóast sviar í tveimum førum mundu vera fegnir um væntandi hepni hjá gøtumonnum. Fyrst royndi Magni seg við einnum frekum lobbi úr 40 metrum, men málverjin mundi draga andan lættari, tá hann sá bóltin detta á nettakið. Seinni gjørdist Hans Pauli Petersen púra leysur, men málverjin fekk onkursvegna sligið bóltin upp um málið.

Ístaðin kundu sviar móti endanum økja upp í 2-0, tá teir í mótálopi komu ígjøgnum vinstrumegin, og framman fyri málið kundi Mathias Graven ótarnaður senda bóltin í netið.

**Flott avrik**

Hetta seinna málið mundi taka tað seinastu vónina frá gøtumonnum, men sum heild kunnu teir gulu tó vera stoltir um avrikið.

Tá sæð verður burtur frá fyrstu løtuni, vóru teir í stóran mun við til at skapa dystin, og við eitt lítið sindur av hepni, kundu teir eisini fingið meira burtur úr.

Leikarar fyri leikara stóðu teir seg eisini sum heild væl. Sum omanfyri nevnt, so var Bartal framúr, men eisini Magni Jarnskor sýndi stórspæl. Bert spell at hann ikki fekk krýnt rimmar innsatsin við einum máli. Helgi L. Petersen setti veruliga ferð á, tá hann kom á vøllin, og so eigur ein ikki at gloyma, hvussu væl allir teir ungu menninir stóðu. Hóast teir ikki hava nakað serligt av rutinu, so sá hetta als ikki út til at nerva nakran teirra. Óimponeraðir fóru teir undir uppgávuna, og verður hetta lagið framyvir, er eingin orsøk at rokna við, at GÍ ikki fer at verða eins frammalaga í føroyskum fótbólti komandi árini, sum teir hava verið, síðani teir fluttu upp í bestu deildina.

Skal peikast á nakrar veikleikar í GÍ avrikinum, eru tað tveir leikarar í landsliðshópinnum, sum standa fyri skotum. Henning Jarnskor var undan dystinum skaddur, men onkursvegna varð hann tó pjøssaður saman. Avrik hansara kundi tó bent á, at hann als ikki var 100%. Tá sviar vóru vandamiklir, var tað aloftast í hansara borði, at uppspælið kom, og hetta eigur ikki at henda hjá einum somikið royndum leikara. Heldur ikki avrikið hjá Sunnvardi Joensen var lýtaleyst. Ikki tí, í sjálvum tí at verja málið stóð hann seg væl, hóast hann tíðliga í dystinum mundi mist eitt skot, men veikleikin er, tá hann skuldi sleppa sær av við bóltin. Tá fóru útspørkini sendandi í allar ættir, so har er í øllum førum okkurt at arbeiða við.

Samanumtikið var spælið hóskvøldið tó ein positiv uppliving, og orðini frá Magna Jarnskor undan dystinum gjørdust so avgjørt ikki minni aktell. Tá helt hann, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn føroyskt lið kemur víðari í europeiskum høpi. Svensku liðini hoyra so avgjørt ikki til millum tey veikastu í Europa, og við eitt sindur av hepni í lutakastinum, átti so avgjørt at verið møguleiki fyri, at orðini frá GÍ liðskiparanum koma at halda. Í øllum førum um spælið hjá GÍ hóskvøldið skal vera galdandi fyri føroyskan fótbólt sum heild.

**GÍ- IFK Norrkøping 0-2**

0-1: Jonas Wallerstedt 55.
0-2: Mathias Graven 84.

**GÍ:**

Sunnvad Joensen – Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, Leivur Hansen – Rúni Justinussen, Pauli Jarnskor, Jóan Pauli Olsen, Magni Jarnskor, Henning Jarnskor – Óli Hansen, Súni Olsen

**IFK Norrkøping:**

Eddie Gustafsson – Mikael Strøm, Kleber Saarenpåå, Fredrik Bild, Mathias Floren – Mattias Østberg, Mikael Blomberg, Jonas Bjurstrøm, Kristian Bergstrøm – Jonas Wallerstedt, Mathias Graven

# Uppeftir

*Magni Jarnskor hevur enn ikki slept vónini um at fáa eina hampuliga góða endastøðu í landskappingini*

JÁKUP MØRK

Liðskiparin hjá gøtumonnum, Magni Jarnskor, er vanliga ein teirra, sum gongur fremst, tá stríðast skal, og í so máta var dysturin hóskvøldið einki undantak.

**Skulu longur upp**

Um sjálvan dystin helt liðskiparin, at teir sum heild kunnu vera nøgdir um avrikið. Hann iðraði seg, eins og liðfelagarnir um, at teir einki mál fingu, men alt í alt mundi sigurin hjá gestunum vera í lagi, helt hann.

Úrslitini hjá sigursvandu gøtumonnunum hava annars ikki verið av teimum bestu í ár, men hetta tykist tó ikki at nerva liðskiparan.

- Vita hava longu tryggjað okkum europeiska luttøku komandi ár, og so mugu vit bara royna at klintra longur upp á stigatalvuna, segði hann um vónirnar fyri tað, sum er eftir av landskappingini. Víðari vísti hann á, at GÍ liðið í ár hevur havt nógvar skaðar at dragast við, og hetta hevur viðført, at venjarin alla tíðina hevur veirð noyddur at gera broytingar á liðnum.

Um vónirnar um returdystin í Svøríki um tvær vikur, helt Magni Jarnskor, at har fór setningur teirra at verða hin sami:

- Vit mugu bara royna at halda tætt fyrstu løtuna, og so arbeiða okkum spakuliga fram eftir vøllinum.

Um hetta opnast, verður so fyri fyrst ein ósvaraður spurningur, sum greiða fæst á um knappar tvær vikur.



# Stríddust væl

*Svenski venjarin var nøgdur um sigurin, men rósti samstundis gøtumonnum fyri hugburðin, sum teir sýndu á vøllinum*

JÁKUP MØRK

Venjarin hjá IFK Norrkøping, navnframi Olle Nordin, helt eftir dystin, at lið hansara hevði uppiborið sigurin.



*Vit sleptu takinum, eftir at vit høvdu lagt okkum fram um, helt Olle Nordin*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

**Góvust at trýsta**

Um spælið segði venjarin, at hann var væl nøgdur fram til leiðslumálið hjá sínum monnum, men at teir eftir hetta góvu gøtumonnum dekan ov gott pláss at spæla á.

Hann vísti annars á, at Norrkøping vanliga er sera sterkt, tá skjót mótálop skulu setast í gongd, men dysturin í dag sum so ikki legði upp til slíkt spæl frá teirra síðu. Kortini var hann nøgdur um, at tað í stóran mun eydnaðist teimum at spæla seg ígjøgnum í borðunum, soleiðis at álopsspælið ikki gjørdist alt ov einstáttað.

**Upptikin av heildini**

At enda spurdu vit hann sjálvsagt, hvat hann helt um mótstøðuliðið, og um tað var nakar einstakur leikari, sum hann hevði bitið merki í, og hesum svaraði hann ógvuliga siðiliga, uttan tó at gera ov nógv av:

- GÍ liðið var sum so ógvuliga væl skipað, og so spæla teir við einum ófatuliga stórum hjarta. Var vandi á ferð, toygdu menn seg í hvørjari lykkju, soleiðis at teir nærum altíð fingu vart fyri. Seinna spurninginum haldi eg meg ikki vera føran fyri at svara. Tá lið mítt spælir, eri eg somikið bitin av sjálvum dystinum, at eg als ikki gevi mær far um, hvussu hvr einstakur leikari stendur seg.

# Torført á grasið

*Johan Nielsen var sum heild nøgdur um avrikið hjá sínum monnum hóskvøldið*

JÁKUP MØRK

Í leikskránni undan dystinum stóð at lesa, at tá Johan Nielsen hevði verið á spiónferð í Svøríki, hevði han millum annað lagt til merkis, at sviar í stóran mun nýttu vinstru síðu, tá farast skuldi frameftir.

Hóskvøldið kundi verið líkt til, at venjarin í ov stóran mun hevði hugsað um hetta, tá spæliætlanin varð løgd til rættis, men hesum var roynd venjarin als ikki samdur í.



**Eingin fyrimunur**

- Hvørja síðu teir gera mest nýtslu av, er nakað, sum vit finna út av, meðan dysturin er. Tað ber sum so ikki til at spáa um hetta frammanundan, og undir taktikfundinum var hetta als ikki nakað evni, svaraði Johan, tá vit spurdu hann um hetta.

Um dystin helt hann annars, at hann kundi vera væl nøgdur um avrikið hjá leikarum sínum:

- Fyrstu løtuna sleppa teir alt ov lætt, eins og markeringar okkara eru alt ov leysar, men vit spæla okkum tó væl upp. At trýstið er somikið stórt fyrstu løtuna, haldi kemur eins nógv av teirra dygdum, heldur enn ov stórari virðing frá okkara síðu, men hinvegin skulu vit eisini umstilla okkum fyrstu løtuna. Sjálvt um vit á pappírinum hava heimavøll, so er tað jú eingin fyrimunur hjá okkum, tá spælt verður á grasi, og hetta er eisini ein stór orsøk til ógvusliga trýstið fyrstu løtuna, greiddi hann frá.

Annars var GÍ venjarin serliga fegin um, at tað eydnaðist teimum at skapa so nógv frameftir, eftir tvær báðar útskiftingarnar miðskeiðis í seinna hálvleiki. Hóast vandi sjálvandi var fyri einum máli hinvegin, so hevði GÍ fleiri góðar royndir seinasta partin av dystinum, og sum so var einasta viðmerking hansara, at hann kundi hugsað sær eitt mál burtur úr dystinum.

**Royndirnar**

GÍ er helst tað felagið, sum hevur drúgvasta royndirnar her heima, tá tosað verður um altjóða uppgávur, og venjarin er samdur í, at eisini hetta hevur sítt at siga.

- Summir av leikarunum hava roynt so at siga alt, og hetta hevur sjálvandi sína ávirkan, soleiðis at tað eisini verður lættari hjá ungu leikarunum, segði hann um hendan spurningin.

Um royndirnar hja gøtumonnum so eisini eru nóg nógvar til at fáa eitt hampuligt úrslit á útivølli kann bert tíðin vísa.

# Oddaliðið uttan Allan Mørkøre

*Oddaliðið HB tekur leygardagin ímóti NSÍ í Gundadali, men tað verður uttan Allan Mørkøre, sum meiddi seg í dystinum móti KÍ*

*Allan Mørkøre fær ikki verið við, tá HB sunnudagin skal royna at styrkja um oddastøðuna*



HEINI Í SKORINI

Oddaliðið HB tekur sunnudagin ímóti einum NSÍ liði, sum í løtuni sær út til at vera sera væl fyri. NSÍ var í einum aldudali fyri summarsteðgin, men teir tykjast nú at vera komnir fyri seg. Seinasta vikuskfitið vunnu teir sannførandi á FS Vágum, og teirra álopstrupulleikar síggja út til at vera loystir, nú Christian Høgni Jacobsen, sum tá skeyt tvey mál, er komin fyri seg aftur.

**Allan Mørkøre skaddur**

Hjá HB fekk Allan Mørkøre eina fipurspreinging í sínum fyrsta landskappingardysti í ár móti KÍ seinasta vikuskiftið, og hann hevur ikki vant alla vikuna. Hann verður sostatt ikki við móti NSÍ, men annars eru allir tøkir hjá oddaliðnum HB, sum kann økja um leiðsluna, um VB ikki fær fulla úrtøku í torføra dystinum móti KÍ.

NSÍ fer suður til Havnar við sterkastu manning, við tað at hvørki leikbann ella skaðar eru at dragast við inni í Runavík. NSÍ fer tí væntandi at stilla upp við sama fólki sum seinasta vikuskiftið móti FS Vágum, og er tað eitt sterkt lið, sum kann geva HB trupulleikar.

# Tvey lið skulu hava endurreisn í Vágunum

*Í Vágunum hittast sunnudagin tvey lið í stórari kreppu. B36 fekk eina ringa byrjan uppá seinnu hálvu, meðan FS Vágar enn sær út til at vera eitt niðurflytingarlið*

HEINI Í SKORINI

B36 kom í eina stóra kreppu, eftir at John Petersen fór til Íslands miðskeiðis í fyrru hálvu, og tað tykist ikki, sum teir eru komnir úr kreppuni aftur eftir summarsteðgin, hóast teir hava styrkt seg við tveimum útlendingum.

Teir taptu nevniliga fyrsta landskappingardyst teirra eftir steðgin móti B68, og síðani vórðu teir snøgt sagt sorlaðir sundur 8-0 niðri Gladsaxe móti AB í Europa Cup, hóast teir tá í løtum vístu, at teir kunnu spæla góðan fótbólt.

**Ronnie úti restina av kappingini**

Til dystin sunnudagin er Bjarni Prior enn skaddur, meðan Ronnie Samuelsen kom út fyri eini sera keðiligari hending, tá B36 var í Danmark og leikti Europa Cup. Hann meiðslaði seg illa uttanfyri vøllin, við tað at hann onkursvegna fór ígjøgnum ein glasrút, og fekk hann hópin av pentum í beinið. Hann meiðslaði seg so illa, at hann eftir øllum at døma ikki leikar aftur í ár, og er tað ein dyggur smeitur fyri B36, við tað at Ronnie hevur verið millum bestu leikararnar í ár hjá teimum. Annars eru allir menn tøkir, og m.a. verður spennandi at síggja, hvussu fyrrverandi FS Vágar leikarin Darius Magdisauskas fer at klára seg móti gomlu liðfeløgum sínum, eftir alt stríðið sum hevur staðist av hansara skifti til B36.

**Ivamál hjá FS Vágum**

Hjá FS Vágum skal eingin sita uttanfyri við leikbanni, meðan teir hava nøkur ivamál viðvíkjandi skaðum. Sonni Johansen, Jack Johansen og Hannus Olsen eru allir ivasamir til dystin, men sagt verður úr Vágum, at møguleiki er fyri, at teir spæla við móti B36. Um FS Vágar skal venda ringu gongdini, er møguleikin til staðar sunnudagin móti einum B36 liðið í stórari kreppu.